## Gáloysin ráðharri



Í Kanada hevur Maxime Bernier, innanríkisráðharri, lagt frá sær, eftir at tað bleiv avdúkað, at hann hevði lagt loynilig skjøl frá sær á einum óhóskandi staði, sum sagt verður. Innanríkisráðharrin hevur leingi verið undir trýsti, tí herfyri kom fram, at hansara fyrrverandi unnusta hevði samband við skipaðan kriminalitet, skrivar Reuters. Maxime Bernier er úr konservativa flokkinum og hevur verið innanríkisráðharri síðani í fjør.

# Móðurmerkjakrabbamein í vøkstri

**Hagtøl eru nú tøk yvir gongdina innan krabbamein í Føroyum, og tølini vísa, at gongdin innan ávís krabbameinssløg er alt annað enn ynskilig. Eitt slag, sum sær út til at vera í vøkstri í Føroyum, er móðurmerkjakrabbamein**

HEILSA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Sosialurin skrivaði fríggjadagin um føroysku krabbameins hagtølini, sum nú er tøk á www.ancr.nu. Hini norðurlondini hava í fleiri ár havt hagtøl, sum vísa gongdina innan krabbameinssjúkur. Hesi hagtøl kunnu tildømis nýtast at meta um tørvin á krabbameinsviðgerðum og til at raðfesta fyribyrgjandi átøk.

Fleiri altjóða kanningar hava seinastu árini víst á vandan fyri móðurmerkjakrabbamein, tá fólk fáa ov nógva sól. Og føroyskir læknar hava eisini ávara, tí man hevur havt eina hóming av, at hetta slagið av krabbameini er í vøkstri í Føroyum.

Nú eru vísindalig og samanbarlig hagtøl tøk, og hesi vísa, at eins og Íslandi, er móðurmerkjakrabbamein ein vaksandi trupulleiki í Føroyum. Serliga millum yngri kvinnur.

### Ein keðilig menning

Danski yvirlæknin og serlæknin í krabbameini, Hans Storm, var í Føroyum og legði nýggju hagtølini fram, og hann staðfesti, at meðan tølini fyri móðurmerkjakrabbamein liggja í einari fastari legu í hinum norðanlondunum, eru Ísland og Føroyar í einari serstøðu.

- Føroysku tølini fyri móðurmerkjakrabbamein vaksa eins og tey íslendsku, um enn ikki líka nógv. Og tað keðiliga er, at tað serliga eru ungar kvinnur, sum er hart raktar, sigur danski læknin frá Kræftens Bekæmpelse.

Hann vísir á norska kanning, sum staðfestir, at serliga nýtsla av solarium økir um vandan fyri móðurmerkjakrabbamein.

Bæði Ísland og Føroyar høvdu fyrst í 1990unum tey lægstu norðurlendsku tølini fyri móðurmerkjakrabbamein, men meðan miðaltølini fyri hini norðurlondini hava ligið í stað, eru tey íslendsku eksploderaði, og tey føroysku eru eisini á veg uppeftir.

Sí norðurlendsku tølini fyri krabbamein hjá kvinnum millum 15 og 49 á talvu.

### Granskingarmøguleikar

Hvørjar orsøkirnar fyri føroyska vøksturin er, er ikki vísindaliga staðfest, men Føroya Felag Móti Krabbameini vónar at nýggju hagtølini fara at gera tað lættari at granska - og fáa stuðul til at granska – hví ávís krabbameinssløg



eru í vøkstri í Føroyum, meðan onnur eru í minking. Og gongdin innan móðurmerkjakrabbamein er kanska eitt upplagt granskingarøki.

Hans Storm frá danska Kræftens Bekæmpelse vísir á, at útlendskar kanningar hava staðfest, at samband er millum sól og móðurmerkjakrabbamein. So møguliga er broytingin í føroysku og íslendsku tølunum eitt úrslit av broyttum lívsstíli við solarium og uttanlandaferðum. Men hetta er ikki vísindalig staðfest.

# Gevast við sigling til Scrabster

**Faroe Ship kunngjørdi í síðstu viku, at felagið hevur gjørt av at gevast við teirra rutu úr Føroyum til Scrabster**

FARMAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Síðani seint í 2003 hevur Faroe Ship annars havt fráferð úr Runavík til Scrabster mánadag og fríggjadag og úr Havn til Immingham fríggjadag. Men framyvir verður tað so bert fráferð av Havnini til Immingham fríggjadag.

- Fyri útflytarar av feskum fløkum og óviðgjørdum fiski, er tað ikki heppi, at Faroe Ship nú gevst við fráferðini mánadag. Avleiðingin av bert at hava eina fráferð um vikuna er, at allur fiskur, sum skal feskur ella óviðgjørdur av landinum, má avreiðast nøkulunda samstundis. Tá verður alt útboðið kroyst saman, og roknast kann við, at marknaðurin bjóðar lægri prís. Tað ger ikki støðuna betri, at vit nú noyðast at koma á marknaðin samstundis sum tann íslendski fiskurin, ið eisini bert hevur eina fráferð um vikuna, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðuni www.industry.fo

Í dag avreiða línuskipini ikki týsdag, tí eingin fráferð er aftur til bretska megin-landi fyrr enn fríggjadag. Við verandi rutu hevur verið møguligt at avreitt mánadag og fingið fiskin avskipaðan mánakvøld. Um hetta ikki verður møguligt framyvir, koma línuskipini heldur ikki at avreiða mánadag, og tá verða tað bert tríggir dagar eftir um vikuna, har fiskavirkini fáa møguleika at virka línufisk.

Hjá trolbátunum, ið fara at royna á landleiðini frá 1. juni til 31. august, kemur henda broytingin eisini illa við.

- Teir avreiða nógvan flatfisk, sum ikki verður virkaður í Føroyum, men ferð óviðgjørdur til Onglands. Nú fara møguliga allir trolbátarnir, at avreiða hósdag, tí vøran skal vera í Havn seinnapart fríggjadag. Hjá línuskipunum er tað kanska ein møguleiki at sigla beinleiðis til marknaðin í Onglandi, men hetta letur seg ikki gera hjá trolbátunum. Trolbátarnir kunnu nevniliga bert fiska á landleiðini í avmarkaða tíð, og skulu teir sjálvir sigla niður við fiskinum fáa teir færri túrar, og hetta ger, at prísurin skal munandi upp, fyri at teir skulu fáa tað sama burturúr, skrivar Vinnuhúsið.

Samanumtikið harmast Føroya Ráfiskakeyparafelag, at fráferðin úr Føroyum til Onglands mánadag nú verður niðurløgd. Hinvegin vónar felagið, at henda rutan er so mikið áhugaverd, at okkurt annað flutningsfelag sær ein møguleika í, at fara undir eina líknandi rutu.